gult cyan magenta svart

Fólkatónleikarastevnan 2000 10.-17. juli

Í døgunum frá 10. til og vi› 17. juli í ár ver›ur aftur skipa› fyri Fólkatónleikarastevnu. Eins og vanligt vera konsertir í bygd og í b‡, og tónleikarar úr Føroyum og ø›rum londum vera vi›. Útlendsku gestirnir í ár eru bólkurin »Utla« úr Noregi, trummuleikarin Malick Jagne úr Gambia, heimskendi svenski tvørfloytu- og sopransaxofonleikarin Anders Hagberg og tvímansbólkurin »Tonemakeriet« úr Noregi, sum eisini var og vitja›i í gjør.
Millum føroysku luttakararnar eru »Shalder Geo«, »Enekk«, Hanus Johansen, »Ivory«, Niels Midjord, Hans Jacob Hansen, Petur Jákup Eliasen, n‡ggi spælimansbólkurin »Gigl« og ein uppaftur n‡ggjari bólkur, i› kallar seg »Økusól«.

Utla

Utla (Noreg)

Teir, i› manna bólkin eru Håkon Høgemo, hardingfiól, Terje Isungset, ásláttur og Karl Seglem, tenorsaxofon, i› allir úr úrmælingar á ljó›førum sínum. Bólkurin hevur fer›ast um alt Europa, í USA, Canada og Japan og givi› 4 fløgur út vi› sínum egnu kompositiónum tilrættisleggingum av si›bundnum norskum tónleiki.

Malick Jagne (Gambia)

spælir djembe og a›rar vesturafrikanskar trummur. Hann er uppvaksin í Gambia og b‡r í løtuni í Danmark, har hann spælir ásláttur í fleiri ymiskum tónleikabólkum, eitt nú »Dandala«.

Anders Hagberg (Svøríki)


Anders Hagberg

Anders Hagberg úr Svøríki er ein ógvuliga royndur tvørfloytu- og sopransaxofonleikari vi› beinunum í mongum ymiskum tónleikasløgum, heimstónlist, jazzi, rokki o.ø. Hagberg fer›a›ist m.a. í nøkur ár vi› bólkinum »New Jungle Orchestra« saman vi› tónleikarum sum Pierre Dørge, Marilyn Mazur og John Tchicai. Er í løtuni ein av limunum í heimskenda svenska/indiska heimstónlistabólkinum »Mynta«, sum higartil hevur givi› f‡ra fløgur út og hevur fleiri fer›ir veri› í Føroyum sum limur í nor›urlendska »Yggdrasil«, sum er ein jazz-bólkur vi› »heimsta›i« her á klettunum.

Tonemakeriet ella Kjekk Norsk Ungdom (Noreg)

Hetta eru Audun Austli, i› spælir kassagittar, og Kyrre E. Slind, i› spælir indiskan sitar. Teir spæla egi› tilfar, og vóru vi› á stevnuni í fjør.

Shalder Geo

spæla tilrættisleggingar av hetlendskum si›bundnum fióltónleiki, føroyskum skjaldrum, kingosangi o.ø.

Bólkurin var í vár á konsertfer› í Sámalandi, Svøríki, Finnlandi, Estlandi og Danmark og ta› er sama manning, i› ver›ur vi› á stevnuni í summar. He›in Ziska Davidsen, el-gittar, Høgni Klakkstein, trummur, Mikael Blak, kontrabass og Kristian Blak, klaver.


Hanus Johansen, i› er aktuellur vi› fløgu, fer á stevnuni at syngja n‡ggj løg

Enekk

eru Agnar Lamhauge, kontrabas sog el-bass, Óli Olsen, ljómbor›, Arni Carlsen, ljómbor›, Ey›un Lamhauge, harmoniku, Justin Philbrow, el-gittar, Høgni Klakkstein, trummur og Kári Sverrisson, kokles, gittar, fiól og sang.

Á skránni er n‡tt tónleikatilfar.

Hanus Johansen,

i› júst hevur givi› fløgu út saman vi› »Aldubáruni«, fer á stevnuni at syngja n‡ggjar sangir vi› egnum løgum.

Bólkurin fer seinni í summar til Grønlands at spæla. Í hópinum eru Hjalti Joensen, el-gittar, Agnar Lamhauge, bass, Marita av Steinum, tvørfloytu, Óli Olsen, ljómbor› og Arni Carlsen, ljómbor›.

Niels Midjord, Petur Jákup Eliasen og Hans Jacob Hansen

syngja kingo. Hesafer› eru ta› serliga sjósálmar, i› eru á skránni, solei›is sum Marius Vilhelmsen úr Sy›radali á Kalsoynni sang teir.

Aldubáran er til rei›ar til Fólkatónleikarastevnuna

Eivør Pálsdóttur er vi› á Fólkatónleikarastevnuni í ár

(Mynd: Dagfinn Olsen)

Ivory

eru Eivør Pálsdóttir, sang, Búi Dam, gittarar og ásláttur, Brandur Jacobsen, trummur, Jón Tyril, ásláttur og Mikael Blak, kontrabass. Tey syngja og spæla egnan tónleik vi› stø›i í jazzi og etniskum tónleiki. Malick Jagne úr Gambia er gestatónleikari.

Økusól

spæla tilrættisleggingar av si›bundnum føroyskum og grønlendskum tilfari, umframt egnar kompositiónir.

Gigl

er ein n‡ggjur spælimansbólkur. Løgini, i› bólkurin framførir, eru úr nótabókini hjá J. C. Svabo, sum hann byrja›i at skriva í 1775, løg hjá Ívari Bærentsen, okkurt heimagjørt lag og annars si›bundin dansitónleikur úr Írlandi, Skotlandi, Svøríki og ø›rum londum. Tey, i› eru vi›, eru Marita av Steinum, tvørfloytu, Ey›un Lamhauge, harmoniku, Agnar Lamhauge, kontrabass, Justin Philbrow, kassagittar og Kári Sverrisson, fiól.

Shalder Geo eru aftur av fer› í grannalondum okkara og eru vi› á Fólkatónleikarastevnuni

Skráin fyri stevnuna

Mánadagin 10. juli kl. 20 í Losjuni í Gøtugjógv
Shalder Geo, Økusól, Hanus Johansen, Enekk – aftaná spæla »Taxi«.

T‡sdagin 11. juli kl. 15 í Grasagar›i í Havn
Malick Jagne (Gambia), Gigl.

kl. 19-22 á Háskúlanum í Havn
Trummuskei› vi› Malick Jagne úr Gambia. Tilmeld. tlf. 441653 og tlf. 442115 (Jón Tyril).

Mikudagin 12. juli kl. 19.30 í Nor›urlandahúsinum
Hanus Johansen, Økusól, Tonemakeriet (Noreg), Ivory (vi› Malick Jagne, ásláttur).

Hósdagin 13. juli kl. 15 í Listaskálanum í Havn
Barnatiltak vi› konsert og dansispølum. Sharon Weiss lærir okkum ymsar dansir, vit læra skjaldur og lurta eftir tónleiki. Ókeypis atgongd.

Kl. 19.30 í Nor›urlandahúsinum
Shalder Geo, Enekk, Utla (Noreg).

Fríggjadagin 14. juli kl. 18.15 umbor› á »Smyrli« á veg til Su›uroyar
Tonemakeriet (Noreg), Hanus Johansen, Anders Hagberg (Svøríki), Kristian Blak og Mikael Blak.

Kl. 20 í Skálavík:
Enekk, Utla (Noreg).

Kl. 21 í Klubbanum á Tvøroyri
Tonemakeriet (Noreg), Hanus Johansen, Anders Hagberg (Svøríki), Kristian Blak og Mikael Blak.
Leygardagin 15. juli kl. 15-17 í Grasagar›i í Havn: Gigl, Shalder Geo og Anders Hagberg (Før./Svøríki).

Sunnudagin 16. juli kl. 16 í Havnar kirkju
Niels Midjord, Petur Jákup Eliasen, Hans Jacob Hansen og Kári Sverrisson syngja kingosálmar. Anders Hagberg, Kristian Blak og Mikael Blak spæla ljó›føristónleik.

Mánadagin 17. juli kl. 12
ger Nor›l‡si› fer› út í Hest, har Anders Hagberg spælir solo í Klæmintsgjógv. Vit vera aftur á Havnini álei› kl. 18.

gult cyan magenta svart

Ætla longu at byrja upp á undirsjóvartunnilin í heyst

Eftir ætlan ver›ur byrja› uppá arbei›i› at gera undirsjóvartunnilin longu í næsta mána›, ella í í september. Gongst sum ætla er koyrandi ígjøgnum hana á vári í 2003

Tunnilin kastar nógv arbei›i av sær og væntandi ver›a einar 30 milliónir goldnar í lønum um ári›

ÁKI BERTHOLDSEN

Gongur, sum ætla›, ver›ur fari› undir arbei›i› at gera undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi longu í næsta mána›, ella í hvussu so er í september.

Ta› sigur nevndin í P/F Vágatunlinum aftaná a›alfundin í felagnum í farnu viku

Á a›alfundinum var roknskapurin gó›kendur, men, sum vænta› vísti hann eitt hall uppá 360.000 krónur.

Felagi› hevur, sí›ani ta› var› stovna› gjørt íløgur fyri 4,7 milliónir krónur í forkanning og projekteringinina av tunlinum.

Gransko›arin var afturvaldur. Somulei›is var nevndin afturvald, tó var Oyvindur Brimnes valdur í nevndina fyri Dávid Reinert Hansen, sum nú er stjóri í felagnum.

Í nevndini sita annars Klæmint Weihe, forma›ur, umframt Bergur í Gar›i, Jens Kári Vilhelm og Heri M. Hammer.

Á a›alfundinum var› samtykt at hækka partapeningin vi› 20 mió kr, so at partapeningurin nú ver›ur 60,3 mió kr.

Byrja› í næsta mána›

Annars sigur nevndin í Vágatunlinum, at linjuføringin fyri sjálvan tunnilin er eitt líti› sindur broytt aftur ímóti uppskotinum hjá Landsverkfrø›inginum seinast í áttatiárunum, so nú ver›ur hann um 4,9 kilometrar langur ísta›in fyri teir 4,7 kilometrarnar, sum upprunaliga mett.

Bo›ini uppá at gera tunnilin eru uppá millum 151,6 og 207,4 milliónir krónur. Afturat hesum koma príshækkingar, broytingar, asfaltering, elarbei›i og tilfar, skelti og trygdarútger›, byggilei›sla, eftirlit og fíggingarkostna›ur v.m.

– Linjuføringin fyri vegin er var›veitt, tó er ein rundkoyring projektera› vi› Lenar, eins og vegurin er lagdur, so at ætla›a ídna›arøki› hjá Sandavágs kommunu oman fyri Fútaklett darvast sum minst.

Bo›ini fyri allar vegirnar og anna›, vóru millum 21,7 og 36,7 milliónir krónur

– Afturat hesum koma príshækkingar, broytingar, asfaltering, vegastokkur, skelti, endurgjald v.m. fyri lendi, innkrevjingarstø›, byggilei›sla, eftirlit og fíggingarkostna›ur v.m.

Arbei›i› uppá vegirnar kann væntandi byrja í juli í ár og tunnilsarbei›i› kann byrja í august/september í ár.

Hendir einki óvænta›, kann tunnilin sostatt takast í n‡tslu á vári í 2003.

Men nevndin leggur afturat, at ta› var so drúgt at fyrireika og vi›ger›a anleggslóga, at arbei›ini kundu ikki ver›a bjó›a› út fyrr enn nú í vár, heldur enn seinasta heyst, sum upprunaliga ætla›.

– Tá i› avtala er gjørd um arbei›ini, ver›ur alt projekti› dagført. Fíggingin er frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar, og endalig fígging nú er tøk.

Fyribilstøl benda á, at samla›a verkætlanin kann gjøgnumførast fyri tær ætla›u 240 mió kr, sigur nevndin í Vágatunlinum.

Annars eru 160,3 milliónir játta›ar felagnum eftir anleggslógini, ella 20 milliónir um ári›.

30 milliónir í lønum

Verkætlanin er ein tann størsta á samfer›sluøkinum seinastu árini.

Og ta› er ikki sørt av arbei›i›, hon fer at kasta av sær

Nevndin metir, at í byggití›ini ver›a lønarútgjaldingarnar ver›a einar 30 milliónir krónur um ári›.

– Men tali› má takast vi› fyrivarni, tí endaliga b‡ti› av kostna›inum, og hvussu stórur partur av kostna›inum, i› er lønir, veldst um hvussu arbei›stakarin leggur arbei›i› til rættis.

– Ávirkanin á føroyska búskapin veldst eisini um antin løntakararnir búgva og ver›a skatta›ir í Føroyum, ella ikki.

Annars metir nevndin, at rakstrarútrei›slurnar av felagnum vera okkurt 1,5-2,0 milliónir krónur um ári› í byggití›ini.

Íløgurnar ver›a um 80 milliónir um ári›, um tær ver›a toluliga javnt í byggití›ina tó ver›a íløgurnar væntandi 40 mió krónur í ár, sigur nevndin fyri P/F Vágatunnilin.

Gera frítí›arskúla á Tvøroyri til 25 børn

Skúlin byrjar tá i› skúlaári› byrjar aftur í august og skuldi tørvur veri› á tí, ber til at hækka barnatali›

Frítí›arskúlin á Tvøroyri fær gó›ar umstø›ur at húsast undir, tí ta› er her, í ni›aru hædd í Ítróttarhøllini og skúlanum í Trongisvági, at hann skal vera. Og har eru nógvir hentleikar, sum børnini kunnu brúka íme›an tey eru í skúla

ÁKI BERTHOLDSEN

Ta› eru nú naka› langt sí›ani, at foreldur á Tvøroyri gingu hús úr húsi og heittu á fólk um at skriva undir eina áheitan á Tvøroyrar B‡rá› um at seta ein frítí›arskúla í Kommununi.

Hetta hevur kommunan tiki› til eftirtektar. Og nú er komi› so langt, at skúlin letur upp longu um ein gó›an mána›, tá i› skúlin byrjar aftur. B‡rá›i› hevur søkt eftir lei›ara til skúlan, umframt eftir einum pedagogi. Hesi bæ›i starvsfólkini koma at arbei›a fulla tí› – í hvussu so er lei›arin – men harumfrat er ætlanin at hava eitt hjálparfólk at arbei›a umlei› hálva tí›.

Og hesa vikuna hevur ta› eisini bori› til at tekna børn til frítí›arskúlan.

Bergur Bærendsen, forma›ur í sosialu nevnd í b‡rá›num á Tvøroyri, sigur, at skúlin hevur fingi› gó›a undirtøku, tí ta› hava longu 15 børn tekna› seg til skúlan, hóast tekningin bara hevur veri› í tríggjar dagar.

Ta› ver›a annars pláss fyri 25 børnum í n‡ggja frítí›arskúlanum á Tvøroyri.

Men skuldi tørvur veri› á tí, ber ta› til at hækka barnatali›.

Forma›urin í sosialu nevnd væntar tó ikki, at ta› ver›ur gjørt ta› fyrsta ári›.

– Eg haldi, at ta› hevur t‡dning at fáa skúlan í eina trygga legu, á›renn vit fara at hugsa um at hækka barnatali›, sigur hann.

Hann sigur, at børnini, sum kunnu koma í skúlanum eru tey, sum ganga í 1.,2. og 3. flokki.

– Tó ver›ur ta› so, at vit byrja í tí yngra endanum, so at børnini í 1. flokki hava fyrimun og ver›a tikin framum. Tey pláss, sum sí›ani leypa av, ver›a tilluta› børnum í 2. flokki. Og tey pláss, sum tá leypa av, koma børnunum í 3. flokki til gó›ar, sigur Bergur Bærendsen.

Hann sigur, at skúlin kemur at halda til í ni›aru hædd í ítróttarhøllini og skúlanum í Trongisvági. Arbei›i› at innrætta hølini er byrja›. Har fær skúlin gó› og rúmlig høli. Har ver›ur stórt felagshøli, eitt verksta›, goymsla, wc til næmingar og wc til starvsfólk, og starvsfólkarúm. Í hæddini omanfyri er matstovan í ítróttarhøllini og hana skal frítí›arskúlin eisini brúka.

Annars sleppur skúlin at brúka teir hentleikar, sum eru í húsinum, m.a. ítróttarhøllina og skúlahøllina.

Annars er svimjihylur og graslíkisvøllur úti á Tvøroyri, umframt a›rir hentleikar, sum børnini kunnu brúka.

– Hetta er eisini eitt øki vi› nógvum børnum, tí bæ›i barnagar›ur, vøggustova og dagrøktin er alt styttri enn 200 metrar frá frítí›arskúlanum.

Frítí›arskúlin letur upp hvønn dag, tá i› børnini fáa frí úr skúlanum, helst umlei› kl. 11.30.

– Tá i› børnini fáa frí úr skúlanum, ver›a tey heinta› og flutt í frítí›arskúlanum, har tey so ver›a ansa› undir tryggum umstø›um til kl. 17.15, ella har á lei›, tá i› foreldrini koma eftir teimum.

Bergur Bærendsen sigur, at hann væntar ikki, at hetta fer at kosta kommununi naka› serligt, tí hann kennir nógv foreldur, sum bara vilja arbei›a hálva tí›, av tí, at tey hava ikki ansingarmøguleikar til børnini allan seinnapartin. Annars fer ta› at kosta kommuni umlei› 500.000 krónur um ári› tilsamans. Hann sigur, at ta› fer at kosta foreldrum einar 600 krónur um mána›in at hava eitt barn í frítí›arskúlanum. Ta› er minni enn 1/3 av tí, sum ta› kostar at hava eitt barn í frítí›arskúla.